

ini tí at nógv av oljufeløg-unum eru har, og tí flestu av íslendsku íleggjarunum eisini halda til her.

At løtan júst nú er vald kann so eisinivera tí, at fleiri almennar føroyskar fyritøkur skulu privatiser-ast, eitt nú Føroya Tele, Atlantsflog, Føroya Banki og aðrar stórar fyritøkur, so man er opin fyri fleiri mo-dellum, hvussu tað kann vera gjørt og fyri útlendsk-um íleggjarum. So ein kann siga, at hesin dagurin eisini kann síggjast sum tað at skapa áhuga fyri tí, sum kann henda. At lata upp eyguni hjá útlendingum fyri Føroyum og soleiðis at føroyingarnar sum vera við kunnu fáa kontaktir við tann fíggjarheimin, sum er uttan fyri Føroyar, eitt nú í London og sum man kanska kann arbeiða víðari við.

### Vitja á Man

Ætlanin er eisini, at lands-stýrismaðurin í fíggjarmál-um, Báður Nielsen skal vitja á oynni Man, har hann skal hoyra um, hvussu man hevur havt eydnuna við sær við at fjøltátta bú-skapin. Teir hava havt eina klára strategi um at gera búskapin meira fjølbroytt-an. At fara frá einum bú-skapi, sum bygdi næstan 100% á ferðavinnu til ein búskap, sum byggir á fleiri onnur bein, t.d. eina væl-virkandi skipaskráseting, miðdepil fyri fíggingar-stovnar o.a.

Eftir kunningina bjóðar danski sendiharrin til eina hugnaløtu.

Tað eru annars skjótt trý ár síðani, at føroysk sendi-stova varð latin upp í London. John Rajani hevur verið har frá byrjan og gevst í London í september. Hetta tiltakið verður so eitt av teimum stóru. Vit spurdu hann, um skrivstovan hevur verið Føroyum hent og um hetta er ein skilagóð ráð-festing av føroyskum myndugleikum. Hann sig-ur, at hetta má so vera upp til føroyskar myndugleikar at meta um, antin vit skulu hava sendistovur uttanlanda – um vit vilja selja Føroyar politiskt, vinnuliga og tá brúka sendistovur sum eina kobling millum myndug-leikar og vinnulív. Spurn-ingurin er hvat man vil og hvussu man skipar tað. Hann vísir annars á, at tað eru veldugir møguleikar í Bretlandi. Vit hava nógvar uppgávur her. Her búgva 60 mill. fólk. Bretland og her serstakliga Skotland er og kann gerast ein stórur sam-starvspartnari, bæði innan fiskivinnu, alivinnu, orku og olju, útbúgvingarstovnar og mentanarlív.

Stóri kunningarfundurin, sum verður hildin í London, mikudagin 18. mai er so ein nýggj byrjan í møguligum samstarvi millum føroyskt vinnulív og útlendskar fyritøkur.


Oljejakt verden rundt

Det er tre år siden enheten Global leting (Global Exploration, GEX) i Internasjonal undersøkelse og produksjon ble opprettet. På den tiden har Statoil sikret seg andeler i 17 nye lisenser internasjonalt og fått tilført 735 millioner oljeekvivalenter.

*At Føroyar kunnu gerast eitt av teimum mest áhugaverdu økjunum at gera íløgur í, eitt nú innan oljuvinnu, sæst ma. av hesi raðfestingini í innanhýsis blaðnum hjá risaoljufelagnum Statoil. Har verður greitt frá altjóða oljuleiting og eftir øllum at døma meta oddafólkini í Statoil, skulu vit ganga út frá hesi myndini, at Føroyar teljast millum fremstu og mest spennandi íløguøkini*

GEX håper på suksess på Færøyene.

# Óttast kinesisk klæði

VINNUSÍÐU-KLUMMAN
*Finnbogi Ísakson*



Tann bíliga arbeiðsmegin í Kina, sum gerst alsamt betur útbúgvin, hevur rættiliga loypt hvøkk á Vesturheimin. Fiskur verður fluttur úr Føroyum til Kina, har - eftir okkara mátistokki - undirløntir kinesarar virka hann til so bíliga, at tað loysir seg at flyta hann yvir hagar og aftur á evropeiska markn-aðin, har hann verður seldur.

Í grannalondum okkara missa fólk arbeiði ár um ár, tí fyritøkurnar flyta sítt virksemi til Kina. So við og við kemur India eisini upp í part. Meir enn trið-ingur av heimsins íbúgv-um búgva í hesum londum - 1,3 miljardir í Kina og 1,1 í India, íalt 2,4 miljard-ir fólk. Tilsamans er fólka-talið í verðini 6,5 miljard-ir. Tað er sostatt eitt ófati-liga stórt menniskjansligt tilfeingi, Kina og India hava. Avleiðingarnar av fráflytingini av arbeiðs-plássum er ræðandi. Bara í Danmark hvurvu 15.000 arbeiðspláss í fjør, tí fyri-tøkurnar fluttu til lág-lønarlond, fyrst og fremst Kina.

Tað er alheimsgerðin, globaliseringin, sum hevur hesar broytingar við sær. Kapitalurin flytur alla tíðina úr einum landi í annað, alt eftir hvat loysir seg best hjá fyritøkunum. Margaret Thatcher í Bretlandi og Ronald Reagan í USA vóru forsprákarar fyri teirri ótálmaðu kapi-talismuni, sum skuldi hava frælsi at ferðast ótarnað millum lond.

Bretland og USA eru framvegis tey londini, sum taka best undir við hesum politikki. Á evropeiska meginlandinum er tað Týskland, sum eltir hini bæði londini mest. Tey smáu londini í Evropa, eitt nú Norðurlond, halda seg ikki hava annan møguleika enn at fylgja við og royna at skapa nýggj arbeiðs-pláss fyri tey mistu.

Hini stóru londini í Evropa - burtursæð frá Týsklandi - eru ikki so fús at lata alheimsgerðina fara avstað við sínum arbeiðs-plássum, minka skattin og vælferðina. Eitt av londun-um, sum er rættiliga aftur-haldandi, er Frakland.

Sunnudagin visti bretska útvarpið BBC tey tíðini, at franska stjórnin er stúrin fyri teimum nógvu klæðunum, sum floyma úr Kina inn yvir evropeiska marknaðin. Franski ídnaðarmálaráð-harrin Patrick Devedjian segði, at vandi var fyri, at 7000 arbeiðspláss hvørva í Fraklandi, um Kina ikki avmarkar sín útflutning av klæðum. Hann kom við sínari viðmerking, eftir at handilskomisserurin hjá ES, Peter Mandelson, hevði byrjað kjak um hetta mál.

Í 1974 varð ein kvotu-skipan gjørd fyri útflutn-ingi av klædnavørum úr øllum londum. Avtalan var galdandi í 30 ár og fór sostatt úr gildi 1. januar í ár. Síðani hevur Kina økt munandi um sín útflutning av klædnavørum.

Alheims handilsfelags-skapurin WTO upplýsir, at í 2003 framleiddi Kina 17% av øllum klædnavør-um í heiminum, men rokn-að verður við, at fram-leiðslan fer at økjast til 50% eftir trimum árum, av tí at Kina hevur so stóran fyrimun av lágum lønum og øðrum framleiðslu-kostnaði.

Devedjian segði, at *"støðan er sera hættislig fyri okkara klædnavirki, tí henda vinnan hevur longu havt tað ringt í mong ár."*

Hann heitti á ES um at fylgja amerikanska fyri-døminum og samtykkja lógir, sum avmarka kines-iska útflutningin.

Hetta er loyvt sambært WTO-reglum. Reglurnar eru, at lond, ið eru í vanda fyri, at klædnamarknaður teirra syndrast orsakað av innflutningi úr Kina, kunna sjálvi avmarka vøksturin í innflutningin-um til 7,5% um árið fram til ár 2008. Tíðindamenn siga, at tað kjakið, sum Peter Mandelson hevur sett í gongd, kann hava við sær, at slíkar avmarkingar verða settar í verk.

Franski forsætisráðharr-in Raffarin hevur júst ver-ið á vitjan í Kina. Í einari røðu segði hann seg vóna, at tað ikki fór at verða neyðugt hjá ES at seta slíkar innflutningsavmark-ingar í verk. Í staðin heitti hann á Kina um sjálvt at avmarka útflutningin av klædnavørum til Evropa.

Málið er rættiliga á-hugavert út frá tí, at tað er ein spurningur, hvussu tey stóru londini í Evropa og kanska aðrastaðni við fara at reagera, um teirra ar-beiðsloysi veksur nógv av tí, at kinesarar kunna framleiða vørurnar nógv bíligari.